tla bygdarskúlanum

Saman við garðvaktini dáma gentunum væl at hoppa band í fríkorterinum

Hugurin at undirvísa, hann er hin sami og góði, hóast tað bert verða einir 15 næmingar næsta skúlaár

Her í Haldórsvík er jú ikki so frægt sum ein handil

Gott samstarv við aðrar bygdaskúlar

At hava og ikki minst at varðveita ein slíkan barnaskúla er sjálvandi ein stór avbjóðing fyri lærararnar

SKÚLI
Snorri Brend

Lærararnir við Haldórsvíkar skúla eru greiðar yvir, at ein slíkur skúli er ein ynskidreymur hjá teimum smærru næmingunum, tí teir eru í einum tryggum og kendum nærumhvørvi.

Hinvegin kann tað kanska vera eitt sindur meiri óinteressant fyri ein einsamallan næming í 6. og 7. flokki.

Hesin aldursbólkurin vil jú helst vera saman við sínum javnaldrum, soleiðis at tey fáa sammett seg við onnur. Fyri at tryggja teimum henda møguleikan, hevur Haldórsvíkar skúli eitt sera gott samstarv við aðrar smærri skúlar í nánd av honum.

- Tað er sera týdningarmikið at vit eisini hava gott samband við teir skúlarnar, sum virka undir somu umstøðum sum vit, sigur Nomi.

Kavadagur

Mesta sambandið man skúlin í Haldórsvík hava vit teir seks næmingarnar í skúlanum í Tjørnuvík.

Tey hittast fleiri ferðir um vikuna, har tey m.a. eru saman um lærugreinarnar handverk og list, eins og tey svimja saman í skúlanum á Oyrarbakka.

Við millumbilum eru tey í Funningsfirði, har bæði umstøður og góður mannligur lærari er til undirvísing í smíði. Tá tey eru har hevur tann lærarin, sum fer við børnunum úr Haldórsvík, handarbeiði saman við næmingunum.

Í aðrar mátar hava tey eina rættiliga fasta skipan um samstarv við hinar skúlarnar. Ein dag um árið eru børnini úr Haldórsvík, Tjørnuvík, Gjógv, Funningi og Funningsfirði saman, og nú mánadagin fara tey øll til Funnings sum er føst føstulávintsbygd hjá skúlunum.

Umframt hetta so hava tey nógv annað til felags, m.a. ein kavadag í februar ella mars, har børnini úr skúlunum í Haldórsvík og Tjørnuvík hugna sær í kavanum og sova saman.

- Tá ein er í einum lítlum skúla er altíð lættari at gera slík impulsiv ting. Tað er meiri rúmligt á henda hátt, sigur Nomi.

Fyrimunurin við hesi skipanini er m.a. hann, at ein næmingur í 3. flokki kann skilja nógv betri tað, sum verður undirvíst í 2. flokki, um hann ikki skilti tað árið fyri

fylgja so væl við í undirvísingini, staðfestir hon.

Skúlin í Haldórsvík er tvíflokkaður, soleiðis at næmingarnir í 1. til 4. flokki ganga fyri seg og tey í 5. til 7. flokk ganga fyri.

Fyrimunurin við hesi skipanini er m.a. hann, at ein næmingur í 3. flokki kann skilja nógv betri tað, sum verður undirvíst í 2. flokki, um hann ikki skilti tað árið fyri.

Hinvegin kann ein dugnaligur næmingur í 2. flokki fáa nyttu av undirvísingini og tilfarinum í flokkinum oman fyri, av tí at tey jú øll eru í einum og sama høli.

Ein av uppgávum hjá lærarunum er júst tann, at tey ikki ynskja at steðga teimum, sum hava hug at taka við tí tilfarinum, sum teir eldru næmingarnir skulu læra í somu skúlastovu.

Avbjóðingin hjá lærarunum er tí at hugsa breitt, soleiðis at tann einstaki næmingurin kann kenna seg tryggan í tí lítla skúlanum.

Sjálv heldur Nomi vansarnar við einum slíkum bygdarskúla verða munandi færri enn fyrimunirnir. Hon dugir kortini væl at síggja, at tað kann vera eitt sindur einsligt hjá teimum eldru næmingunum.

Er lærarabólkurin ikki so breiður, kann vera torført at finna breiddina í tí fakliga.

- Tí er bæði gott og neyðugt at vit kunnu samstarva við aðrar skúlar í økinum innan ávísar lærugreinar, sigur Nomi.

- Neyðugt er at samstarva við hinar skúlarnar, sigur Nomi Jacobsen, skúlaleiðari

Heppin at hava góðar lærarar

Í einum komandi blaði hitta vit Gurið Samuelsen, sum umframt at vera lærari, eisini er ein av bygdaráðslimunum í Sunda kommunu. - Vit hava verið heppin, og hava havt sera góðar lærarar í Haldórsvík og í Tjørnuvík. - Og tað týdningarmesta er at børnini eisini merkja tað og eru nøgd við skúlan, sigur hon.